B68-HB 1-1 (0-0):

# Stólparnir hildu við HB



Álopsmenninir hjá HB høvdu tað alt annað enn lætt sunnudagin. Millum annað tí teir fingu lítlan stuðul frá miðvøllinum

Mynd: Finnur Justinussen

**B68 sendi tríggjar ferðir í stólpan, men teir megnaðu enn eina ferð ikki at fáa fulla úrtøku á heimavølli ímóti einum av liðunum, sum teir kappast við**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Fegnastu menninir á grasinum á Svangaskarði, tá fíni dómarin, Petur Skarðenni, bríkslaði fyri síðstu ferð, vóru hvítklæddu HB spælararnir. At teir vóru væl nøgdir var einki at undrast yvir. Teir vóru komnir eftir javnleiki, teir vóru komnir afturum aftaná, at teir høvdu havt vindin undan, teir høvdu sera fáar royndir ímóti toftamálinum, men kortini fingu teir eitt mál og javnleik.

Útjavnandi HB málið, sum teir fingu eitt korter undan leikloki, skoraði Rógvi Jacobsen upp á brotsspark. Hann var púra kaldur, tá hann sendi málverjan til vinstru fyri seg sjálvan, og so varð bólturin rullaður í hitt borðið. Meistari fyri brotssparkinum var Andrew av Fløtum.

Teir tríggir álopsspælararnir hjá HB, sum higartil í ár hava verið besta vápnið hjá teimum, høvdu tað ikki lætt hesa ferð. Jan Petersen hevði fyri tað mesta gott tak á Una Arge, og Jón Rói Jacobsen var tað so nógv minni um, enn tað plagar at vera. Stuðulin frá miðvallarunum var ikki nakað serligur. Álopsmennirnir runnu fyri tað mesta eftir longum sendingum. Og um tað eydnaðist at temja, so vóru møguleikarnir at spæla víðari fáir.

Men kortini eydnaðist tað Andrew av Fløtum, sum var best upplagdur av HB álopsmonnunum, at tiltuska sær møguleikan, sum bar útjavnandi málið við sær. Eftir at B68 var komið framum, flutti Andrew eitt vet longri aftur á vøllin. Tað vóru boðini frá venjaranum í vónini um, at tað skuldi gerast eitt sindur tættari millum keturnar. Andrew vann bóltin eitt sindur frammanfyri miðstrikuna, tá B68 temjing meiri enn hálvkiksaði. Hann sneiddi framvið fleiri, og tað eydnaðist honum at koma í brotsteigin, áðrenn Hans Fróði Hansen royndi at takla. Dómarin var eirindarleysur ímóti bróðrinum í B68 miðverjuni, Petur vísti á ellivu metur blettin, og so var 1–1, og harvið varðveitti HB frástøðuna til B68.

HB spældi uttan fleiri av teimum, sum hava verið við til at vunnið so nógv í ár. Ingi Rasmussen og Janus M. Joensen vóru vongtverjar, og teir hildu seg konsekvent til verjupartin og vóru so at siga ikki frammanfyri miðstrikuna. Uppgávan hjá Inga var stór. Ímóti sær hevði hann Øssur Hansen, sum enn eina ferð var besti maður á vølli.

## Heimaliðið nógv pláss

B68 hevði nógv pláss at spæla á, og serliga eftir steðgin, tá teir høvdu eystanvindin undan, megnaðu teir at samanspæla. Vongverjarnir, Jan Petersen og John Heri Dam, bjóðaðu seg til, og á miðvøllinum var Jann Ingi Petersen íðin, og Marlon Jorge spældi seg upp, eftir at hann hevði kiksað sjey av níggju fyrstu ferðunum, hann hevði bóltin.

Trupulleikin var tyngdin í álopspartinum. Marcello Marcellino, sum mikukvøldið var avloysari hjá skadda Anders Nygaard, var ikki tøkur hesa ferð, og hóast Øssur Jacobsen stríddist væl og var um reppið at fáa mál, so sást tað, at hann var neyðloysn sum júst miðframherji.

Men B68 hevði møguleikarnar at gera fleiri mál. Eftir innlegg frá Arnoldi Joensen í vinstru, út frá og innaftur, varð Øssur Jacobsen blankur eitt sindur til vinstru í brotsteiginum, men skotið brast í nærra stólpan. Og í 2. hálvleiki vóru stólparnir tvær ferðir í vegin. Eftir langt og neyvt skift frá Fróða Benjaminsen og sending frá Øssuri Jacobsen, kom Øssur Hansen í vinstru inn ímóti málteiginum, men skotið brast í nærra stólpan, og fram ímóti dystarenda, tá B68 royndi at leggja trýst á fyri at fáa sigursmálið, vóru teir aftur óhepnir. Arnold Joensen royndi seg úr stórari fjarstøðu, Bárður Johannesen tveitti seg til høgru fyri seg sjálvan, men hann rakk ikki bóltinum, sum brast í nærra stólpan og fór framvið málstrikuni og út hinumegin.

Einasta málið fekk B68, tá 2. hálvleikur var átjan minuttir gamal. Tá høvdu teir í eina løtu trýst, m. a. høvdu havt trý tøtt hornaspørk, áðrenn teir fingu hol á. Øssur Jacobsen fekk tiltuskað sær eitt fríspark miðskeiðis á HB helvtini í vinstru. Arnold Joensen legði hálvhøgt í brotsteigin, bólturin tóktist snitta onkran á vegnum, sýnið hjá málverjanum var vánaligt, tí har var so nógv fólk frammanfyri, og so sigldi bólturin í handara síðunetið.

Men enn eina ferð megnaði B68 ikki at varðveita leiðsluna. Eitt mistak kostaði eitt mál, og fyri aðru ferð í fýra dagar mistu teir leiðsluna og harvið tvey stig á heimavølli.

**Dysturin í tølum:**
**B68-HB 1-1 (0-0)**
1-0: Arnold Joensen, 64
1-1: Rógvi Jacobsen (br.), 86

**Dómari:** Petur Skarðenni

**B68:** Michal Kokoszanek – Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira, John Heri Dam – Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Marlon Jorge – Arnold Joensen, Øssur Jacobsen, Øssur Hansen
**HB:** Bárður Johannesen – Ingi Rasmussen, Hans á Lag, Jan C. Dam, Janus M. Joensen – Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Nicu Dogaru – Jón Rói Jacobsen, Uni Arge, Andrew av Fløtum.





Øssur Hansen hevur verið besti málskjúttin hjá B68 í ár, og hann var nær við at avgera, men skotroyndin móti dystarenda brast á stólpan

Mynd: Finnur Justinussen



Andrew av Fløtum var maðurin aftan fyri brotssparkið, sum bjargaði HB annað stigið

Mynd: Finnur Justinussen

# B68 og HB spæla javnt triðju hvørja ferð

**Í 22 landskappingardystum á Svangaskarði hevur HB vunnið átta ferðir, B68 hevur vunnið sjey ferðir, og javnleikurin sunnudagin var tann sjeyndi**

B68-HB
*Jóannes Hansen*

KÍ og HB hava altíð verið í fremstu deildini í fótbólti. Saman við teimum hava tvey onnur lið verið í 1. deild síðani 1981. Talan er um eysutoyarliðini GÍ og B68. Dysturin á grasvøllinum sunnudagin var tískil 22. ferðin, at B68 hevði vitjan av HB í landskappingini.

Hagtølini siga, at býtið millum heimasigrar, javnleikir og útisigrar er rættuliga javnt. Javnleikurin hesa ferð var tann sjeyndi, og hetta var triðja ferðin, at úrslitið hevur verið 1–1. Hinar ferðirnar vóru í fyrraárið og í 1993.

Í sigrum er HB omaná. Átta ferðirnar eru havnarmenninir farnir av Svangaskarði við øllum stigunum. Men teir hava ikki vunnið síðani í 1999. Tá vunnu teir 5–1, sum er størsti sigurin, teir hava vunnið á Toftum.

B68 hevur vunnið sjey ferðir. Síðsti sigurin var í fjør, tá teir vunnu 2–1.

Tilsaman hevur B68 skorað 26 mál á heimavølli ímóti HB, sum hevur fegnast um mál á Svangaskarði 33 ferðir.

Í Gundadali er HB eisini omaná. Teir hava vunnið tíggju dystir, B68 hevur vunnið tríggjar ferðir, og átta ferðir hevur tað verið javnleikur. Málmunurin heimaliðnum til fyrimunar er 46–28. Síðsta ferðin, at B68 vann í Gundadali ímóti HB var í fyrraárið, tá teir vunnu 4–3. Í fjør vann HB 3–1.

B68 og HB skuldu havt spælt á Svangaskarði í fyrsta umfarinum í ár, men sum kunugt vóru fyrsta og sætta umførini býtt um, tí tað var verkfall. Hetta er orsøkin til, at tað verður sera tætt millum landskappingardystirnar hjá hesum báðum liðunum í ár. Tey hittast aftur í Gundadali í 10. umfarinum, sum er á skránni 7. juli.

## Jan átti síðsta fótin á B68 málinum

**Fyrrverandi B68 spælarin, sum nú er krumptappur í HB verjuni, heldur, at hann og liðfelagarnir hava alla orsøk at vera nøgdir við javnleikin**

B68–HB
*Jóannes Hansen*

Álitið í miðverjuni hjá HB er Jan C. Dam. Tað hevur hann so mangan verið, men tað varð ikki roknað við, at hann skuldi vera so eyðsýndur í ár.

Í fyrraárið og í fjør spældi Jan við B68. Tá hann í fjør takkaði fyri seg á Toftum, segði hann, at ætlanin var at trappa niður við fótbóltinum.

*Og nú ert tú á veg aftur ímóti landsliðnum?*

– Nei, tað eri eg ikki, men eg havi góðan hug at spæla, og higartil í ár eri eg sloppin undan skaðum. Tað hevur sera nógv at siga.

*Men tú ætlaði at hugna tær í 2. deild hjá HB?*

– Púra rætt. Men áðrenn Ion Geolgau fór til hús í vetrarfrí, heitti hann á meg um at venja saman við 1. deildarhópinum. Hann segði seg hava brúk fyri mær. Eg byrjaði so at venja, og tá eg slapp undan skaðum, so vaks hugurin, og nú er tað heilt stuttligt.

Jan C. Dam var sera væl dámdur í B68 (tað er ikki so undarligt, tí hann er av fittastu fólkum). Tá vit tosa við hann um dystin sunnudagin og um málið, sum B68 fekk, so veit Jan nakað at siga, sum tey flestu uttanfyri vøllin ikki sóu nakað til.

– Eg var tann síðsti, sum nært bóltinum, áðrenn hann fór í málið hjá okkum. Nógv fólk var í brotsteiginum, tá Arnold sendi frísparkið innfyri, og bólturin kom í skinnabeinið á mær, so hann fekk kós uppeftir og í handara síðunetið.

Harvið kunnu vit staðfesta, at Jan C. Dam gav fyrrverandi liðfeløgunum ikki eina hjálpandi hond, men eitt hjálpandi skinnabein!

*Tit eru nøgdir við javnleikin?*

– Tað kanst tú ætla. Vit spældu ikki væl. B68 trýsti okkum, og tað var torført at venja seg at spæla á grasi, og vindurin órógvaði. Vit vóru hepnir, tí B68 rakti tríggjar ferðir í stólpan, men so skal leggjast afturat, at útjavnandi málið hjá Andrew av Fløtum var staðfesting av, at vit hava eitt sera vandamikið álop. Hesa ferð spældu vit ikki sjampanjufótbólt. Tað gjørdu vit heldur ikki í Vági. Men vit hava fingið tveir javnleikir í torførum útidystum. Nú skulu vit spæla tveir útidystir afturat. Skála og EB/Streymur eru í niðara endanum. Sovornar dystir mugu vit vinna, um vit skulu hugsa um FM, men tað verður avgjørt ikki lætt, sigur Jan C. Dam, sum hevur verið við til at mynda føroyskan fótbólt seinastu fimtan árini, og sum í barndómsfelagnum í ár tykist hava fingið triðja ella fjórða ungdómin!



*Hóast teir enn ikki hava vunnið á útivølli, so tykist Jan Dam vera væl nøgdur um javnleikirnar í Vági og á Toftum*

Mynd: Finnur Justinussen